Semja

millum øðrumegin

Fíggjarmálaráðið

og hinumegin

Fysioterapeutfelag Føroya og Ergoterapeutfelagið

Sáttmálaskeið og lønarkarmur
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2017 til 1. oktober í 2020. Semjan byggir á ein samlaðan 3 ára karm, sum er um 8%. Tann 1. oktober 2017 hækkar mánaðarlønin 0,2% og tann 1. oktober 2018 hækkar mánaðarlønin 1,5% og tann 1. oktober 2019 hækkar mánaðarlønin 1,3%.

Nýggj skalagongd
Tann 1. oktober 2017 er skalagongdin hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum 28, 30, 32, 34 og 36 (óbroytt). Tann 1. oktober 2018 er skalagongdin 28, 30, 32, 35 og 38. Tann 1. oktober 2019 er skalagongdin 28, 30, 32, 35 og 42.

Tað merkir, at ergoterapeutar og fysioterapeutar, sum tann 1. oktober 2018 eru á lønarstigi 34, flyta á lønarstig 35 og fáa starvsaldur við sær og tey, sum eru á lønarstigi 36, flyta á stig 38 og fáa starvsaldur við sær. Tann 1. oktober 2019 flyta tey, sum eru á lønarstigi 38, yvir á lønarstig 42 og fáa starvsaldur við sær.

Ergoterapeutar og fysioterapeutar ganga tvey ár á hvørjum lønarstigi.

Tann 1. oktober 2017 flyta leiðandi ergoterapeutur á psykiatriska deplinum og leiðandi fysioterapeutar á KS og SS av lønarstigi 45 til lønarstig 47 og varðveita viðbótina. Tann 1. oktober 2018 flyta tey á lønarstig 53 og viðbótin fellur burtur. Tann 1. oktober 2019 flyta tey á lønarstig 55.

Tann 1.oktober 2017 flytir leiðarin á Sjóndeplinum av lønarstigi 46 til lønarstigi 48 og varðveitir viðbótina. Tann 1. oktober 2018 flytir leiðarin á lønarstig 58 og viðbótin fellur burtur. Tann 1. oktober 2019 flytir leiðarin á lønarstig 60.

Nýggjar flokkingar
Ein leiðari fyri Ergo- og fysioterapideildina á Landssjúkrahúsinum, skal hava kr. 40.784,94 og varaleiðari skal hava kr. 38.732,14.

Nýggj áseting um barnferð
§ 16. Barnferð
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
Stk. 2. Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinnan fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinnan farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis vera bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.
Stk. 3. Prógvar starvskvinnan við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør meir enn 4 vikur undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinnan hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.
Stk. 4. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
Stk. 5. Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.
Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.
Henda grein fær gildi frá í dag og er eisini galdandi fyri tær barnakonur, sum eru í barsilsfarloyvi við løn frá arbeiðsgevara.

Nýggj sáttmálaáseting
Fysioterapeutar og ergoterapeutar settir í starv við master, kandidat, phd ella professara sum førleikakrav, fáa lønar- og setanarviðurskifti samsvarandi sáttmálanum hjá AKF.

Sáttmáli og lønartalvur verða dagførdar eftir omanfyristandandi.

Í Tinganesi tann 17. desember 2018

Fíggjarmálaráðið

Fysioterapeutfelag Føroya

Ergoterapeutfelagið